# Oljufeløg skipa sítt egna áhugafelag



*Frá seinasta GEM-fundinum, sum varð hildin í Havn.*

*Mynd Jens K Vang*

FOÍB ella Føroya Oljuídnaðarbólkur eitur áhugafelag ella yrkisgagn, sum tey 12 oljufeløgini við leitiloyvi í Føroyum nú stovna.

**OLJUFELØG Í FØROYUM**

*an r*

Tíðin er nú farin frá GEM-samstarvinum millum oljufeløgini og føroyskar myndugleikar – ella rættari, GEM hevur loyst sínar uppgávur – og verður í hesum sambandi tikið stig til eitt heilt nýtt tiltak undir heitinum FOÍB, sum stendur fyri Føroya Oljuídnaðarbólkur. Hetta er eitt áhugafelag hjá teimum 12 oljufeløgunum, sum hava fingið leitiloyvi á føroyska landgrunninum. FOÍB, sum verður felags yrkisgagn hjá oljufeløgunum, hevur sum høvuðsendamál at samskipa og loysa felags tvørgangandi spurningar, ið koma at taka seg upp í kjalarvørrinum av eini komandi oljuvinnu.

Sosialurin skilur, at tað hevur verið arbeitt við hesum sokallaða áhugafelagnum í eina tíð, og nú er so tíðin komin til at seta tað í verk. Umboð fyri øll oljufeløgini eru komin til Havnar í hesum sambandi og verður kunnandi fundur um tiltakið týsdagin.

## GEM givið úrslit

Hetta merkir, at GEM-samstarvið verður uppKloyst. GEM hevur annars útint sínar mongu uppgávur og hevur sum so verið sera hent hjá bæði føroyskum myndugleikum og hjá oljufeløgunum. Byrjanin til GEM var eitt ynski um at seta gongd á og samskipa umhvørvisarbeiðið nú undan tí fyrstu oljuboringini. Fleiri undirbólkar hava arbeitt undir GEM við umhvørvi, veðurspurningum, jarðfrøði og trygd. Úrslitið av øllum tí nógva innsavnaða tilfarinum frá teimum mongu GEM-verkætlanunum er ein databasi, sum kann verða sera hentur hjá øllum, sum hava okkurt tilknýti til komandi oljuvinnu.

Leiðari fyri GEM øll hesi árini hevur verið Halvor Snarvold frá Statoil og verður tað uttan iva eisini hann, sum kemur at standa á odda fyri nýggja tiltakinum FOÍB. Frá føroyskari síðu hevur so Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni verið eitt av oddafólkunum í GEM-arbeiðinum. Atlanticon hevur so virkað sum skrivstova hjá GEM-samstarvinum og bendir alt á, at Atlanticon fer at taka sær av teimum praktisku og fyrisitingarligu uppgávunum hjá FOÍB eisini. Leiðari á Atlanticon er Hilmar Eliassen.

Hann sigur við Sosialin, at nú vit siga farvæl til GEM, man fáur ivast í, at hetta samstarvið hevur havt stóran týdning. Uppbygt er eitt forstáilsi av øllum tí føroyska landgrunninum, sum vit ikki hava havt áður. Tað hevur so eisini verið við til at lyfta upp granskingarstøðið í Føroyum, soleiðis at bæði føroyskir granskarar og stovnar hava verið við í teimum avbjóðingum, sum GEM-verkætlaninar hava havt við sær.

Ringt er at seta á júst hvussu nógv GEM-verkætlanin hevur kostað, men tað man liggja einastaðni millum 20 og 30 mill. kr. ella meira. Hetta eru pengar, sum oljufeløgini hava latið. Men føroyskir stovnar hava so sett fólk og orku til tær ymsu uppgávurnar.

Hvat verða tað so fyri spurningar, sum nýggja felagið FOÍB fer at taka sær av kundi verið spurt. Til tað er at siga, at tað fer at taka sær av málum, sum eru frammi í tíðini, og sum bæði hava við oljufeløgini og føroyska samfelagið at gera. Eitt nú skattaspurningar. Sum so kann sigast, at hetta nýggja felagið fer meira at takast við samfelagsligar spurningar, meðan GEM tók sær av meira fakligum spurningum, sum hava við eina komandi leiting at gera. GEM var meira ein partur av forkanningunum til ta leiting, sum, nú skal fara í gongd og sum kanska endar við framleiðslu um nøkur ár. Har metir man seg so at hava rokkið á mál í tí málsetningi, sum varð settur fyri nøkrum árum síðani. Nú verða so nógv nýggj evni at taka upp.




*Á hesum GEM-fundinum varð tosað um trygd og lógarvirksemi í sambandi við komandi leiting.*

*Mynd Jens K. Vang*